# VEĐRIĐ Á TVØROYRI



# MAI 2024

# VEĐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Tvøroyri ... 3

Veðrið í bygdini ... 4

- Norðan ... 6
- Landnyrðingur norðan ... 6
- Landnyrðingur ... 6
- Landnyrðingur eystan ... 7
- Eystan ... 7
- Landsynningur eystan ... 7
- Landsynningur ... 7
- Landsynningur sunnan ... 7
- Sunnan ... 8
- Útsynningur sunnan ... 8
- Útsynningur ... 8
- Útsynningur vestan ... 9
- Vestan ... 9
- Útnyrðingur vestan ... 9
- Útnyrðingur ... 9
- Útnyrðingur norðan ... 10

**Dagfesting**: 14. mai 2024

**Staður**: Havnalagið 24 – 800 Tvøroyri

**Heimildarfólk:** Chris Jan Michelsen, havnaumsjónarmaður, Kári Jespersen, skjalavørður, Páll Eli Joensen, sjómaður, loðsur og havnarumsjónarmaður & Heðin Joensen, útróðrarmaður.

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Tvøroyri

Tvøroyri er størsti býur í Suðuroy – liggur við ein langan fjørð millum høg fjøll.

Eystanfyri er Suðuroyarfjørður, meðan høg fjøll eru bæði á sunnara armi og tí norðara.

Tey høgu fjøllini norðan- og sunnan fyri bygdina ávirka veðrið í bygdini, og tey eru roknað úr suðri og vestureftir og so eystureftir norðara landinum:

- Vørðan (169m)
- Oyrnafjall (433m)
- Gluggarnir (610m)
- Nakkur (547m)
- Tempulsklettur (403m)
- Kambur (450m)




Mynd 1: Kort av Suðuroy. Tvøroyri er í reyða kringinum

## Veðrið í bygdini

Veðrið á Tvøroyri er tengt at ættini, sum tað er í øllum støðum í Føroyum.

Fjørðurin er opin í landsynning fyri brimi og mjørka, og tað eigur eisini at vera ein ætt við jøvnum vindi. Hvussu lang við síðuna av landsynningi er brim og mjørki, og hvussu nógv verja fjøllini, tá ið vindurin ikki er so nógvur, og og hvussu ójavnan gera tey vindin, tá ið vindurin er nógvur?

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum á Tvøroyri, setti undirritaði seg í samband við Chris Jan Michelsen (**CJM**) havnaumsjónarmann av Tvøroyri. Við sær hevði hann Kára Jespersen (**KJ**), skjalavørð, Páll Eli Joensen (**PEJ**), sjómann, loðs og havnarumsjónarmann & Heðin Joensen (**HJ**), útróðrarmann.

Við til samrøðuna, sum var í havnaskrivstovuni á Tvøroyri, hevði undirritaði spurnarblað til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan er vanliga ein turr og klár ætt á Tvøroyri. Hon roynist nógv betri enn norðanfyri Ættin er góð á landi um veturin fyri bøndurnar. Á norðara landinum er minni vindur enn á sunnara landinum.

Í nógvum vindi eru kastivindar, og hon beinir seg út eftir fjørðinum.

Eingin mjørki er, tá ið ættin er norðan. Brim er inni við landi har úti á fjørðinum.

Gjøgnumgangandi er ættin góð og turr og er ikki skaðaætt í illveðri.

## Landnyrðingur norðan

Tá ið ættin er landnyrðingur norðan, líkist veðrið á Tvøroyri veðrinum, tá ið hann er norðan.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur er vanliga roknað um ein keðilig ætt á Tvøroyri – bæði á sjógvi og á landi.

Er ikki nógvur vindur, er vindurin javnur, og mitt í býnum er næstan stilli. Uttanfyri kann lota heilt fitt – eisini í lítlum vindi – og tí fóru menn ikki til útróðrar, tá ið hann lá av landnyrðingi (konuætt).

Í nógvum vindi er hann ójavnur, og tað er meiri vindur enn aðrastaðni. Hann kann koma sum úr byrsuni. Hvirlurnar koma bóltandi niður í fjørðin, og vindgarðar fara tvørturum. Er fjørður gráur, er ikki útfarandi. Sagt verður, at landnyrðingur er ein lúsaætt, líkamikið hvar hann kemur frá, tí hann melur nokkso nógv á fjørðinum. Hongur skadda yvir fjallinum norðan fyri Tvøroyri, hildnast vindurin betur.

Hóast vindurin er ójavnur, tá ið nógvur vindur er, er ikki nógvir vindskaðar. Tó kann viðhvørt vera ringt innast í Trongisvági.

Landnyrðingur er ein vát ætt á Tvøroyri. Tað kann regna illa við grovum ælingum. Gongur hann úr eystri uppeftir, er vanliga nógv regn, tá ið hann er komin upp í landnyrðing. Tá regnar hann seg upp ímóti norði, og so er turt.

Landnyrðingur er ringasta kavaættin á Tvøroyri – og á allari Suðuroynni. Um várið kann kavi leggjast brádliga á ættini. Kavi av landnyrðingi er vanliga so vátur, at hann er skjótt burtur.

Tað er mjørki viðhvørt, tá ið hann liggur av landnyrðingi. Ættin hevur ofta skaddu við sær – serliga um summarið – og hon kann koma niður ímóti bøgarðunum.

Landnyrðingur er ring brimætt á Tvøroyri. Tað kann súða heilt fitt heilt inni á Drelnesi, og skip kunnu liva nokkso nógv.

Brimið sæst á sunnara landinum við Tjaldravíkshólm og inn á Gálgan, og eisini langt inn á fjørðin. Gamalt var, at sóu teir brim á tanganum í Nesi, var ikki farandi til útróðrar. Fram við sunnara landinum uttarlaga á fjørðinum fór eitt alivirki fyri einki fyri nøkrum árum síðan í landnyrðingsillveðri við nógvum brimi.

Yvirhøvur er ættin keðilig bæði á sjógvi og á landi. Hann setur eitt portur fyri fjørðin – t.e. eingin aktivitetur er.

## Landnyrðingur eystan

Ættin líkist landnyrðingi. Tað gerst óslætt inni við fjørðin, og tað er ringt hjá Smyrli.

## Eystan

Eystan hevur hug at strekkja fjørðin inneftir, líka sum landsynningur, og vindurin er javnur. Ongar hvirlur. Fjørðurin stýrir ættini niðast við, og hann er linari inn eftir fjørðinum.

Eystan er ikki ein serliga vát ætt, men er saman við landsynningi ringasta mjørkaætt. Tað kann vera klárt og sól í Famjin og í Vágum, men svart í toku inn eftir fjørðinum.

Allar eysturættirnar eru brimættir. Tað treffir inn á fjørðin.

Tað er ikki ofta illveður av eystri, og ættin er forútsigilig.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri líkist veðrinum á landsynningi.

## Landsynningur

Hon er ein góð ætt í býnum, men ikki líka góð úti á fjørðinum. Í býnum er vindur javnur. Heitastu ættirnar um summarið eru millum eystan og sunnan.

Landsynningur er vanliga ein rólig ætt á Tvøroyri. Hon kemur ikki úr byrsuni, men spakuliga. Sæst viðhvørt í tí reyða á sólini.

Vindferðin á ættini er sum fyri landið.

Ættin uppførur seg ymiskt, tað velst um um hann fer úr landsynningi upp ella niður. Er hann á veg vesturum, kann hann vera keðiligur og regnar seg vesturum. Í løtuni hann fer vesturum, kann vera stil eina løtu, til hann finnur ættina vestanfyri. Samregnið heldur uppat, men tað er ælaveður. Alt hetta plagar at ganga spakuliga fyri seg.

Gongur hann úr landsynningi og uppeftir, linkar vindurin, og tey leggja lítið merki til hann. Tá er hann ikki so vátur, tó at okkurt ælið kann koma.

Liggja landsynningur er vátur. Tann vátasta ættin sum er á Tvøroyri. Regnið kemur við vestfallinum.

Landsynningur er mjørkaætt, tann ringasta um summarið.

Landsynningur er eisini brimætt. Ringasta aldan, sum kemur inn á fjørðin. Eisini er rennisjógvur (súður).

## Landsynningur sunnan

Tá ið hann liggur av landsynningi suðuri, kann tað hvirla eitt sindur, men líkist annars veðrinum á suðuri.

## Sunnan

Á suðurætt er vindurin nakað ójavnari enn á eysturættunum. Inni í Trongisvági er ættin ring, saman við útsynningi.

Í illveðrinum Berit í november í 2011 vóru nógvir skaðar á Tvøroyri. Teir flestu skaðarnir komu løtuna, hann lá sunnaneftir. Tá ið hann stakk vesturum, bleiv stilt.

Vindurin kemur norðureftir oynni, hann er óstøðugur og ójavnur. Í ringum veðri eru harðar hvirlur, helst í Trongisvági. Fyri at ættin skal blíva ordiliga keðilig, skal vindferðin upp um 20 m/s. Í aðrar mátar er suðurættin ikki ein ætt við nógvum vindi, líkist restina av landinum í so máta.

Hongur skadda yvir Hovstúgvu, er stilt uttanfyri, men eitt hampuligt lot inni á fjørðinum góðveðursdagar.

Tað er ofta nógv regn, tá ið hann liggur sunnaneftir. Tá ið hann regnar seg vesturum, kann tað taka eina góða løtu, og sum oftast er nógvur vindur eisini. Ringast er, í løtuni hann fer vesturum. Eftir tað er stilt ella hvirlur.

Mjørki er viðhvørt á suðurætt. Um sunnarið kann vera mjørki sunnanfyri á allari oynni, men um dagin var klárt á Tvøroyri. Í slíkum umstøðum kann vera óvanliga lýtt – sum tað var á jóansøku í 2009. Meðan kappróðurin var, vórðu máld 24 stig.

Sunnan er ikki brimætt, men uppundir sunnan kann brima á Ørðavík, ikki í Trongisvágsfirði.

Ættin kann vera góð summarætt við góðum sólargangi, men ein lúrin vetrarætt.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er sum útsynningur til vind. Ringasta skaðaætt í Trongisvági.

.

## Útsynningur

Í góðveðri er útsynningur góð ætt á Tvøroyri, men við nakað av trekki, men eisini ringasta skaðaætt í ringum veðri.

Er ættin komin upp í útsynning úr suðuri ella útsynningi suðuri, kann tað tað vera harðligt við nógvum og hørðum hvirlum. Fer hann longur vestur, kann blíva stilt, til hvirlurnar koma. Er hann á veg upp í vestan, fer hann fyrst at mala í hvirlum, áðrenn hann finnur ættina.

Gamalt var at siga, at ættin píndist í ringum veðri – t.e. at hann kundi liggja av útsynningi, ganga upp í vestan og so lækka niðuraftur í útsynning eina løtu. Hetta kann henda bæði einaferð og meir, áðrenn hann til endans liggur av vestri.

Tá ið hann er útsynningur, hongur skadda ofta í Gluggunum og Oyrnafjalli. Vindurin er altíð ójavnur, bæði summar og vetur, men er skadduvindur út Gluggunum, er vindurin eitt sindur minni ójavnur. Er eingin skadda, er hann sera ójavnur.

Tað er meira vindur á Tvøroyri, enn tað er kring landið, tá ið hann er útsynningur. Vanlig hugsan er, at er miðalvindurin kring landið 8 m/s, eru 15 m/s á Tvøroyri. Kappróður á jóansøku er onkuntíð avlýstur, tá ið gott veður hevur verið kring landið av útsynningi.

Uttanfyri kann veðrið vera gott, meðan keðiligt veður er innanfyri. Øvugt konuætt.

Ættin er yvirhøvur turr. Ælaveður kemur við brúgvaløgunum.

Einki brim er á útsynningi, og tað vera kunnu támutir dagar mjørka og sirmi (drivi),

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan er eisini ein ójøvn ætt, sum útsynningur. Ein støk hvirla tók eini heil elementhús, meðan fjørðurin blikaði.

## Vestan

Vestan er ikki líka ójavn ætt sum útsynningur. Beint oman fyri vestan er hann sera javnur. Í illveðri fer vindurin út eftir fjørðinum, líkasum útnyrðingur, og vindferðin er nakað tann sama, sum hon er fyri landið.

Ættin er morgunsúr. Ælaveður kann vera á morgni, men so er betri veður út á fyrrapartin. Nógvur vindur kann vera í skúrum og ælingum. Ælini koma ikki út um Trongisvág, har regnar væl meiri enn á Tvøroyri.

Vestanskúrar, sum koma við brúgvaløgum, kunnu vera sera grovir og kunnu hava hegling í sær – eisini tíðliga um summarið og tíðliga um heystið. Nógvur vindur kann vera við. Eftir skúrarnar er fínasta veður – sól og stilt – luftin er skørp, til at skera í, tí tað verður kaldari.

Tá ið ættin er tvørtur um fjørðin í sambandi við regn, kann vindferðin vera 7-9 m/s oman fyri miðalvindin fyri landið.

Vestan er ikki mjørkaætt. Skadda kann vera um Hvalbiarfjall ella Gluggarnar. Tá kann vera nakað meira vindur. Fer skaddan vekk, minkar tað um vindin.

Vestan er ikki brimætt, tað kann tó hvítta eystanfyri, tá ið óvanlig viðurskifti eru í sjónum – t.d. høgur trýstmunur.

Vestan er góð summarætt, men skaðaætt um veturin.

## Útnyrðingur vestan

Útnyrðingur vestan er javnur. Líkist ættunum báðumegin, tá ið tað kemur til ælaveður.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur er ein góð ætt og strekkir fjørðin úteftir – tað øvugta av landsynningi. Ættin er góð millum hús á Tvøroyri, men tað kann taka leyst úti á fjørðinum.

Vindurin er javnur, og vindferðin er sum kring landið.

Útnyrðingur er ikki ein vát ætt. Tó kunnu koma grovir ælingar. Eitt heglingsæl avlýsti kappróðurin fyri nøkrum árum síðan, tí bátarnir sóust ikki í skúrinum.

Tað er hvørki mjørki ella brim á útnyrðingi. Saltrákið sæst á rútunum á Tvøroyri.

## Útnyrðingur norðan

Útnyrðingur norðan er sum norðan, kemur oman av fjøllunum. Góð ætt við sól um summarið.